# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eitt lið sum Kyndil fer altíð eftir gullinum, so sjálvandi er málið hjá okkum aftur í ár at vinna meistaraheitið.*
*Hjalti M. Jacobsen, Kyndil*



*Sjálvt um vestmenningar hava mist nógv fólk í mun til síðsta kappingarár, so sigur ein av ungu leikarunum, Regin Joensen, at teir framvegis ætla sær at spæla við heilt frammi í oddinum, og at málið fyrst og fremst er at røkka finaluni um meistaraheitið.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nýtt ættarlið skal taka yvir í VÍF

**Fleiri av mest royndu spælarunum hjá VÍF vera ikki við í ár, og tí vera tað fleiri av ungu spælarunum í felagnum, sum skulu taka yvir. Ein av hesum er kvívíkingurin, Regin Joensen. Hann ásannar, at liðið hevur mist nógvar av stóru profilunum, men metir, at ungu spælararnir eru klárir at taka yvir**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

VÍF er næstmest vinnandi liðið í føroyskum manshondbólti eftir Kyndil, sum eisini vann meistaraheitið síðsta kappingarár ímóti júst VÍF. Tað er blivið til heili 21 meistaraheiti í søgu felagsins, og tað síðsta av hesum bleiv vunnið í 2005.

Í nýggju øldini hevur liðið at kalla á hvørjum ári verið við heilt frammi í oddinum. Tað er eisini blivið til trý meistaraheitið seinastu sjey árini, men seinastu fimm árini hevur VÍF havt tað trupult í mest týðandi dystunum. Liðið hevur nevniliga fleiri ferðir tapt í bæði steypafinalum og FM-finalum, og tí eru teir kanska óhepnir ikki at hava vunnið enn fleiri meistaraheiti ella steypafinalur.

Sjálvt um liðið fleiri ferðir hevur tapt mest týðandi dystirnar seinastu árini, so er tó eingin sum helst ivi um góðu hondbóltsevnini í Vestmanna. Og hondbóltsevnunum fáa teir heilt sikkurt brúk fyri í ár. Fleiri av størstu profilunum seinnu árini vera nevniliga ikki at finna á liðnum hjá VÍF í ár av ymiskum orsøkum, og tí vera tað fleiri av ungu leikarunum í felagnum, sum skulu bera liðið víðari.

Vit hava tikið eitt prát við ein av hesum ungu leikarunum, Regin Joensen, sum væntar, at VÍF nokk skal koma at gera seg galdandi.

### Mist nógv fólk

VÍF er helst tað liðið, sum hevur verið úti fyri størstu broytingunum til nýggja kappingarárið. Teir hava mist nógvar av leikarunum, sum hava verið við til at manna liðið, og tað eru fleiri av størstu profilunum, sum ikki vera við í ár.

- Ja, vit hava mist nógv fólk til kappingina, sum liggur fyri framman. Ingi Olsen er blivin venjari hjá Neistanum, Harald Bjørgvin er givin, John Zachariassen verður ikki við fyribils, og harafturat hevur Ái G. Olsen valt at taka eitt sabbatár frá hondbóltinum. Tí vera tað nógvar av yngru leikarunum, sum nú vera fastir á liðnum, sigur Regin Joensen.

Hann heldur tó, at ungu leikararnir eru væl fyri og klárir at taka yvir tær ymisku rollurnar á besta liðnum.

- Vi hava vant rættiliga hart síðani einaferð í august mánaði, og eg haldi, at vit eru í rættiliga góðum form. Nýggi venjarin, Morten Hust Pedersen, krevur rættiliga nógv av okkum leikarum, og eg haldi eisini, at spælararnir lúka krøvini hjá venjaranum. So eg meti heilt víst, at vit eru klárir at fara undir kappingina, heldur Regin.

### Málið er at enda í oddinum

Sum sagt oman fyri, so er VÍF eitt av liðunum í bestu mansdeildini í hondbólti, sum seinastu nógvu árini hevur verið við heilt frammi í oddinum. Sjálvt um liðið hevur mist nógvar spælarar til komandi kappingarárið, so sigur Regin, at málið hjá teimum er at enda heilt frammi í oddinum.

- VÍF miðar altíð høgt í føroyskum hondbólti, og tað er eingin ivi um, at vit aftur í ár ætla at vera við heilt frammi í oddinum. Málið er at koma í finaluna um meistaraheitið, og eru vit fyrst komnir har til, so ætla vit okkum sjálvandi allan vegin, sigur sterki høgri bakkurin.

Regin sigur seg annars vænta eina rættiliga harða kapping í ár, men hann heldur, at kanska serliga KÍF kann fara at yvirraska.

- Kollfirðingar síggja út til at hava eitt rættiliga gott lið, og teir kunnu heilt víst gerast eitt yvirraskilsi í ár. Annars vænti eg eina rættiliga harða kapping, har øll liðini kunnu vinna ímóti øllum, tí liðini tykjast vera rættiliga jøvn, heldur Regin Joensen.

### Góður geistur á liðnum

Tá vit at enda spurdu Regin, hvat hann metti vera sterkastu síðuna hjá liðnum, nevndi hann beinanvegin hugin til hondbólt.

- Hugurin hjá monnum er rættiliga góður at bæði venja og spæla hondbólt, og so haldi eg, at har er sera góður geistur á liðnum. Hetta er nakað, sum vit sjálvandi skulu taka við til fyrsta dystin leygardagin. Harafturat haldi eg eisini, at vestmenningar alt íð hava havt ein góðan vilja, og hesin fer at hjálpa okum í ár, sigur hann.

Hinvegin heldur hann, at manglandi rutinan hjá unga liðnum kann gerast ein trupulleiki.

- Liðið hjá okkum er ungt, og nógvir av leikarunum í hópinum hava ikki tær stóru royndirnar. Tí er rutinan á liðnum ikki so stór. Hetta kann sjálvandi gerast ein trupulleiki til tíðir, men eg trúgvi ikki, at tað fer at bila, sigur kvívíkingurin at enda.

Seinastu nógvu árini hevur VÍF sum sagt verið fastur fúsur í oddinum av føroyskum hondbólti. Nú er tað at kalla eitt nýtt lið, sum fer undir kappingina, og tí verður spennandi at síggja, um ungu menninir fara at halda sær heilt frammi í oddinum.

## Nógvir profilar givnir

VÍF hevur fram ímóti nýggja kappingarárinum mist fleiri av leikarunum, sum hava verið at kalla fastir á liðnum seinastu 10 árini. Ingi Olsen, sum hevur talst ímillum allar bestu leikararnar í landinum, er farin at venja Neistan, Harald Bjørgvin er givin at spæla á hægsta stigi, John Zachariassen ætlar ikki at spæla í ár, og harumframt hevur Áki G. Olsen valt at taka eitt sabbatár frá hondbólti. Harafturat er Áki Olsen so mikið skaddur, at hann neyvan spælir við tann fyrsta góða mánaðin av kappingini, og tí verður tað eitt rættiliga ungt VÍF-lið, sum kemur at royna seg í ár.



## Dani við stýrisvølin

Seinastu nógvu árini hevur Dia Midjord staðið á odda fyri besta mansliðnum hjá VÍF. Dia og VÍF komu tó ásamt um at enda samstarvið undan FM-finalunum síðsta kappingarár, og tí var neyðugt hjá VÍF at finna ein nýggjan venjara. Nýggi venjarin er danin Morten Hust Pedersen, sum hevur fingist nógv við hondbólt. Morten skal nú royna at fáa ungu vestmenningarnar at taka yvir eftir eldra ættarliðið, har flestu av leikarunum nú eru givnir.